Sjúkrarøktaretiska Ráðið



# ÁRSFRÁGREIÐING 2023

# ENDAMÁLIÐ

**Sjúkrarøktaretiska Ráðið hevur til endamáls:**

- At varðveita og menna etiska støðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum og lesandi.
- At vegleiða um etisk ivamál, sum limir og /ella nevnd felagsins leggja fyri ráðið.

**Sum limur í FFS, kann tú seta teg í samband við Sjúkrarøktaretiska ráðið:**

- Tá ið tú stendur í eini etiskt truplari støðu, har tú hevur tørv á ráð og vegleiðing.
- Tá ið tú upplivir støður, ið tú meinar eru í stríð við etisku leiðreglurnar.
- Tá ið tú vilt, at Sjúkrarøktaretiska Ráðið skal viðgera eina etiskt trupla støðu ella tvístøðu, sum viðkemur sjúklingum, avvarðandi, starvsfeløgum ella góðskuni í heilsutænastuni.
- Um tú hevur rís, rós, hugskot ella góð ráð til virksemi felagsins.

**Skriva til etikkur@sjukrarokt.fo**

# INNIHALD

**Ársfrágreiðing 2023** ..... **5**

**Økt tilfeingi** ..... **6**

**Innkomin mál** ..... **7**

Er avgerðin um at skerja rættindi hjá limum eldri enn 70 ár etiskt forsvarlig? ..... 7

Viðmerkingar frá SER til avgerð um eftirlønt, sum var tikin á aðalfundi hjá FFS í 2023 ..... 8

**Hoyring** ..... **9**

Hoyringssvarið ..... 9

**SER 30 ár** ..... **10**

Røðan hjá forkvinnuni í SER ..... 12

**SER á ferð** ..... **16**

**Norðurlendsk ráðstevna** ..... **17**

Framsøgn frá norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðunum í samband við Norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku ráðstevnuna hin 6. og 7. september 2023 ..... 17

Fyrireikingartekstur ..... 18

**Samstarv við onnur** ..... **21**

**Miðling og samskifti** ..... **21**

**Á skrá** ..... **22**



# ÁRSFRÁGREIÐING 2023

Nevndarlimirnir í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum (SER) vóru ómetaliga fegnar um søgurnar, sum komu inn í samband við stuttsøgukappingina, sum samstundis var seinasta átakið, SER hevði á skrá í 2022.

Hugskotið til stuttsøgukappingina spretti úr tí sannroynd, at vit ikki hava nóg gott innlit í, hvørjir etiskir spurdómar upptaka sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Sjálvandi eru spurdómar sum ganga aftur, óansæð hvar ein sjúkrarøktarfrøðingur er staddur, men vit eru eisini "føroyingar serstøk tjóð" í eini føroyskari skipan og mentan. Stuttsøgurnar vóru tí í fyrstu atløgu ætlaðar til SER nevndina, til at greina fram sjúkrarøktaretiskar spurdómar úr søgunum. Hesir skulu so ætlandi leiðbeina okkum í arbeiðnum. Men tá vit vit høvdu lisið tær 10 søgurnar, sum komu inn, komu vit ásamt um at arbeiða við at fáa hesar givnar út í bók. Hetta var tí nakað av tí fyrsta vit tóku fatur á í 2024.

Vit vildu tó fegin hava  Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FFS) við í eitt slíkt átak og nevndin í (FFS) tók tíbetur undir við hesum. Vit settu okkum tí í samband við Sprotan og hava fingið vegleiðing frá teimum til víðari framferð.

Eitt tilmælið var at fáa meira tilfar inn og at víðka tekstasløgini til annað enn stuttsøgur. Vit fóru undir uppgávuna við góðum treysti, men undirtøkan hevur verið ógvuliga lítil. Vit mugu nokk ásanna, at vit hava rakt eitt sindur við síðuna av við hesum átakinum, men halda allíkavæl ikki, at allar súður eru syftar. Átakið hevur ligið í dvala meðan verkfallið hevur verið, men nú tað er liðugt, eru vit so smátt farnar í gongd aftur. Vit hava samskift við ritstjórnina og hava avtalað at hittast aftur allarfyrst í mars mánaði. Hvussu verður og ikki, er í øllum førum ómetaliga týdningarmikið, at frálíku vinnarasøgurnar koma út til almenningin at lesa og brúka so ella so.

# ØKT TILFEINGI

Árini 2020 - 2022 vóru í SER høpi merkt av, at órímiliga nógv tíð fór til at søkja um pening frá stovnum og grunnum, til at kunna skipa fyri tiltøkum og átøkum av ymiskum slag.

Tí avgjørdu vit at søkja nevndina í FFS um at fáa hægri játtan. Harafturat søktu við um at sleppa at broyta viðtøkurnar soleiðis, at vit fingu sjey fullgildar limir í ráðið heldur enn 5 og tveir eykalimir. Eykalimirnir hava allatíðina lagt somu arbeiðisorku í ráðið sum fyrstvaldu limirnir, men hava ikki havt atkvøðurætt, og tað mettu vit verða órímiligt. Hendan seinna umbønin hevði ikki fyri neyðini at fara fyri aðalfundin, men varð játtað av FFS nevndini. Umbønin um hægri játtan var harafturímóti løgd fyri og var samtykt av aðalfundinum. Játtanin hækkaði sostatt frá 30.000 kr til 80.000 kr árliga, frá 2024 at rokna.

Hetta eru vit í SER ógvuliga takksom fyri!

# INNKOMIN MÁL

Vit hava fingið tvey mál inn í ár. Annað er av slíkum slag, at tað ikki letur seg anonymisera og tí verða ongir partar av tí almannakunngjørdir. Hitt málið kom í kjalarvørrinum av aðalfundinum og snúði seg um, hvørt avgerðin um at skerja rættindini hjá limum omanfyri 70 ár var etisk forsvarlig.
Svarið var soljóðandi:

## ER AVGERÐIN UM AT SKERJA RÆTTINDI HJÁ LIMUM ELDRI ENN 70 ÁR ETISKT FORSVARLIG?

*Øll fólk, óansæð aldur, eiga at verða virðiliga viðfarin. Mismunur vegna aldur brýtur við meginregluna um líkavirði og javnstøðu, sum eru týðandi virðir undir bæði generellu samfelagsetikkini og undir sjúkrarøktaretikkini. Tí vil SER altíð taka frástøðu frá aldursmismuni. Av hesum fylgir, at um grundgevingin fyri, at eftirlønt missa valrætt og -bæri er grundað á, at eftirlønt hava ein ávísan aldur, meta vit **ikki**, at avgerðin er etiskt forsvarlig.*

*Grundgevingin sum var givin á aðalfundinum var tó, at av tí at eftirlønt ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, verður ikki mett rímiligt, at tey skulu hava avgerðarrætt til mál, sum hava við arbeiðsmarknaðin at gera. Um vit taka somu prinsippir sum í fyrra døminum, nevniliga líkavirði og javnstøðu, so ber til at tulka hesi virðir út frá regluni hjá Aristoteles um, at "javnlík mál skulu viðfarast javnlíkt og ójøvn mál skulu viðfarast ójavnt, samsvarandi viðkomandi munum". Spurningurin verður tí, um tað at verða á ella av arbeiðsmarknaðinum er ein viðkomandi munur, tá atkvøðast skal um arbeiðsmarknaðar mál. Tað vildu tey flestu nokk tikið undir við, er ein viðkomandi munur. **Av tí sama tykist avgerðin at verða bæði røtt og rímilig**. Tó so, arbeiðismarknaðar mál kunnu raka áhugamál og rættindi hjá eftirløntum, og tá er støðan ein onnur. Tá vildi tað verið diskriminerandi fyri eftirlønarbólkin, at tey ikki hava atgongd til at atkvøða á jøvnum føti við virknar limir, og av tí sama órættvíst og soleiðis **ikki etiskt forsvarligt**.*

*Tá tað er sagt, kann man argumentera fyri, at eftirlønt framvegis eru partar av samfelagnum og at teirra royndir og sjónarhorn kunnu verða virðismikil í avgerðarprosessum, sum ávirka arbeiðsmarknaðin. Tí er ikki vist, at tað er ein so klók avgerð, at útihýsa tey eftirløntu, Men etiskt halda vit, at avgerðin **kann** forsvarast, soleiðis sum vit hava grundgivið fyri omanfyri, út frá teim fortreytum fyri grundgevingini, sum vit hava sett fyri viðgerðini.*

*Tíverri eru grundgevingarnar ikki til taks á skrift, og júst umstøðurnar fyri valið, fer SER at viðgera út frá einum samfelagsetiskum sjónarhorni ein av komandi døgunum.*

Tann viðgerðin sæst her niðanfyri:

## VIÐMERKINGAR FRÁ SER TIL AVGERÐ UM EFTIRLØNT, SUM VAR TIKIN Á AÐALFUNDI HJÁ FFS Í 2023

*Í einum demokratiskum samfelag sum okkara, verður stórur dentur lagdur á samavgerðarrættin hjá landsins borgarum og hendan meginreglan gongur aftur í flestu av samfelagsins stovnum, sum t.d. í fakfeløgunum. Ein onnur meginregla, sum hesir stovnar aloftast byggja á, er nærdemokrati. Tað vil siga, at hóast limirnir geva forfólki og nevnd vald til at taka avgerðir vegna limirnar, so er hetta valdið avmarkað. Skulu broytingar gerast, sum røkka útum tillutaða valdið, er tað aðalfundurin - tað vil siga limirnir sjálvir - sum skulu avgera, um hesar broytingar skulu gerast. Fyri at limirnir skulu hava møguleika fyri at taka avgerðir á upplýstum grundarlag, má møguleiki verða fyri, at hava eina sokallaða demokratiskan samrøðu. Ein demokratisk samrøða er ein týðandi partur av einum vælvirkandi demokratiskum stovni, sum skal tryggja eina rættvísa avgerðarprosess, ið tekur hædd fyri sjónarhornum og áhugamálunum hjá øllum limum*

*Í eini demokratiskari samrøðu, hava allir luttakarir møguleika fyri at siga sína meining og vilja lurta eftir tí sum verður sagt. Á henda hátt verða allar grundgevingar týðiligar og kjakast kann verða um fyrimunir og vansar við teim ymisku uppáhaldunum og grundgevingunum. Tað er sostatt ikki ein kapping um hvør klárar at sannføra hin um, at ein sjálvur hevur rætt, men heldur ein roynd at lýsa málið frá ymiskum sjónarhornum. Tá málið er væl lýst og ein avgerð skal takast, ber til at siga, at limirnir velja á einum upplýstum grundarlagi. Hóast onkur limur tá ikki er samdur, kann hann tó hvíla í, at málið hevur fingið eina fair viðgerð og viðferð.*

*Á aðalfundinum í ár, var avgerð tikin um, at avmarka valdið hjá eftirløntum limum. Málið var lagt fyri aðalfundin og limirnir atkvøddu fyri uppskotinum við stórum meiriluta. Hetta var gjørt eftir reglunum, so juridiskt er onki at lasta nakran fyri.*

*Jura snýr seg um, hvat man skal gera. Í summum førum verður tað sum eitt slag av minsta mark ella minimumskrav fyri, hvat man skal gera. Etikkur harafturímóti snýr seg um, hvat man eigur at gera. Tað merkir, at hóast alt er í lagi løgfrøðiliga, er tað ikki garantur fyri, at tað sum hendir kann forsvarast etiskt. Og her er tað so at demokratiska samrøðan kemur inn í myndina sum ein týðandi súla, til at skapa karmar fyri at viðgerðin av einum máli er etiskt forsvarlig. Afturat tí juridiska og tí etiska aspektinum kemur so praktiska aspektið, sum snýr seg um, hvat man kann gera. Á aðalfundinum er tíðin ein ógvuliga avmarkandi faktorur sum ger, at rúm ikki er fyri eini veruligari demokratiskari samrøðu og av tí sama er møguleiki ikki fyri, at limirnir taka avgerðir á upplýstum grundarlagi. Tí meta vit **ikki**, at viðgerðin av hesum máli, kann metast at verða etiskt forsvarlig.*

*Ein vansi við nærdemokratiið er, at tað í praksis er ógvuliga avbjóðandi at fáast við, m.a. tí at demokratiska samrøðan er bæði tíðar- og pláss krevjandi. Allíkavæl halda vit, at tað ber til at optimera verandi praksis innan rímiligar karmar. Summi mál krevja ikki ta stóru viðgerðina og kunnu saktans rúmast innanfyri verðandi karmar á aðalfundinum. Men onnur mál, sum t.d. viðtøkubroytingin um eftirlønt, sum føra til grundleggjandi broytingar í limatreytunum hjá summum limum, eigur at fáa eina meira gjølla viðgerð. Vit ímynda okkum, at tað t.d. kundi verið gjørt við limafundum, har høvi var at greiða nærri*

*frá og annars at kjakast um málið. Harafturat kundu vit ynskt okkum, at grundgevingin fyri uppskotum, sum verða løgd fyri aðalfundin, verða veitt limunum skrivliga, t.d. í Vøku, so til ber at fyrihalda seg til tað frammanundan. Tí vilja vit heita á FFS um at bera so í bandi, at hetta verður gjørt fyri eftirtíðina.*

# HOYRING

Í mai mánað, fekk SER høvi at verða hoyringspartur í lógaruppskotið um "Bekendtgørelse for Færøerne om tilbagemelding om væsentlige helbredsmæssige fund fra anmeldelsespligtige sundhedsvidenskabelige og sundhedsdatavidenskabelige forskningsprojekter samt visse registerforskningsprojekter".

### HOYRINGSSVARIÐ

Mett verður, at lógaruppskotið er ov óneyvt á hesum økjum:

1. "Tilbagemelding om sekundære fund" kann gerast, tá talan er um sjúku "som kan behandles, forebygges eller lindres". Tað er ógreitt, um hetta eisini fevnir um sjúku, sum kann fyribyrgjast hjá øðrum, men ikki hjá sjúklinginum sjálvum. T.d. kann Huntingtons (og aðrar genetiskar sjúkur) hvørki fyribyrgjast, lekjast ella linnast, men vitanin um hana kann hava stóra ávirkan á reproduktivu valini hjá sjúklinginum. Kanska hetta kemur undir "forebygges", men orðavalið generelt umtalar ikki aðrar persónar enn sjálvan sjúklingin, og í nevndu støðuni er talan um ein annan, potentiellan, persón.
2. Í framhaldi av nr. 1, er tað ógreitt, hvussu lógin fyriheldur seg til familjulimir, íroknað børn. Um man sum granskingarsubjekt ber seg undan at fáa vitan um potentiellar sjúkur, men tað vísir seg at viðkomandi hevur eina genetiska sjúku, sum kann fyribyrgjast ella lekjast, kunnu granskarir so (óbiðin) informera eventuellar familjulimir, sum eisini "eru rakt" t.d. systkin og børn?
3. Lógin tosar um rættin til ikki at fáa informatión, sum mann hevur frábiðið sær, men hon nevnir onki um nakran rætt til at kunna frábiða sær informatiónina í fyrstu atløgu. Hevur man ein slíkan rætt?

Um granskarir koma í slíkar støður, er sostatt eingin vegleiðing at fáa frá lógini.

Har afturat nevnir lógin "en undersøgelse af ydeevne" í §6, sum átti at verið strikað saman við øllum hinum, sum hevur við medisinsk tól at gera.

Samtykta kunngerðin sæst her: https://logir.fo/Bekendtgorelse/1201-af-27-09-2023-for-Faeroerne-om-tilbagemelding-om-vaesentlige-helbredsmaessige-fund-fra-anmeldelsespligtige-sundhedsvidenskabelige

# SER
# 30 ÁR



Í 2023 vóru 30 ár liðin síðan Sjúkrarøktaretiska Ráðið varð sett á stovn. Sambært Vøku nr. 2 frá 1993, var fyrst valda Sjúkrasystraetiska Ráðið fólkað við Ásu á Mýrini, Jóngerð Poulsen, Margit Hansen, Helenu Joensen og Ingrid Holm og eiga tær heiður og tøkk uppiborið, fyri at bjóða seg fram til at seta gongd á arbeiði.

Sum verða man, hevur tað verið ymiskt, hvussu stór orkan hevur verið í ráðnum og til hvørji mál, orkan hevur verið brúkt hesi árini, SER hevur virkað.

Uttan at taka nakað frá nøkrum, havi eg tó hug at nevna eitt avrik, sum eitt av allarfyrstu ráðunum avrikaði í seinnu helvt av 1990´unum. Tá tók Ráðið eitt mál upp av sær sjálvum, soleiðis sum ráðnum varð heimilað longu í teim fyrstu viðtøkunum. Uttan at fara í smálutir, so snúði málið seg um gen-granskingina, sum Pál Weihe vardi av. Tær, sum tá vóru í Ráðnum, fylgdu væl við og kritiseraðu manglandi lógarkarmin um slíka viðkvæma gransking. Tær skrivaðu greinar um evnið og forkvinnan Olga Magnussen var í Degi og Viku og kjakaðist við Pál Weihe, um vandan við ónøktandi lógarverki.

Endin var, at tær fingu steðga verkætlanini og tryggjað, at málið var tikið uppaftur í Løgtinginum, soleiðis at neyðugir lógarkarmar vóru settir.

Tað var ikki granskingina sum so, sum tær funnust at, men tær vildu bara tryggja, at alt rundan um var etiskt og juridiskt forsvarligt. Eitt rættiliga flott avrik, sum vit sjúkrarøktarfrøðingar kunnu verða stoltar av.

30 ára hátíðarhaldið var hildið við eini móttøku á Hotel Hafnia á altjóða sjúkrarøktarfrøðidegnum hin 12 mai. Umframt at forkvinnurnar í ávikavíst FFS og SER hildu røðu, greiddi Maria Andreassen Hentze hegnisliga og rørandi frá leiklutinum sum avvarðandi og avvarðandiumboð á Psykiatriska deplinum. Lena og Niklas spældu nøkur djúp og vónarrík løg og tað gjørdi tað ikki verri, at móður og dóttir, sungu ein sang saman. Ómetaliga vakurt.

Stóra takk fyri, øll tit sum komu á gátt ella í aðrar mátar heilsaðu okkum. Somuleiðis takk til FFS fyri stuðulin.

# RØÐAN HJÁ FORKVINNUNI Í SER

## SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ 30 ÁR Á BAKIÐ - HVÍ, HVUSSU OG HVAT NÚ?

Tað skal sigast, at um tíðin loyvdi tíð, kundi eg havt brúkt nógv meira orku til at finna útav, akkurát hvørjar grundgevingarnar vóru, tá limir í FFS tóku stig til at seta eitt sjúkrarøktaretiskt ráð á stovn. Tí kann eg ikki siga, at skrivligt tilfar ikki finst, men bara staðfesta, at grundgevingarnar ikki eru at finna í VØKU. Tí tað er  Vøka sum er grundarlag undir skrivliga tilfarinum um søgugongdina í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum frá byrjan til 2011, sum Hildur við Høgadalsá og Katrin Andersen eiga  æruna av at hava savnað. Tað er primert teirra yvirlit, eg havi brúkt, til at orientera meg í søgugongdini, men eisini prát við fyrrverandi ráðslimir. Vónandi verða stundir, at skriva eitt lítið 30 ára rit, áðrenn árið er farið.

Hildur og Katrin skriva, at í frágreiðingini frá ársaðalfundinum 11. apríl 1992 verður  greitt frá, at í samband við  stovnsetan av Sjúkrarøktaretiskum ráðnum varð skotið upp, at nevndini verður heimilað at seta ein bólk av 5 sjúkrasystrum. Hesar skuldu umboða heilsu- og sjúkrarøktina breitt, og skuldu  arbeiða við einum uppskoti um viðtøkur fyri Sjúkrarøktaretiskt Ráð. Bólkurin skuldi setast í seinasta lagi á nevndarfundi í juni 1992, og uppskotið verða liðugt at leggja fyri á aðalfundi í 1993 (Vøka nr. 2 1992 s. 12).

Ein arbeiðsbólkur varð settur at gera uppskot til viðtøkur í Etiska Ráðnum, sum vóru samtyktar á aðalfundi felagsins hin 27. mars 1993. Summar keldur siga, at fyrstu leiðreglurnar eisini vóru samtyktar á hesum sama aðalfundi.

Endmálsorðingin við Ráðnum var

- At varðveita og menna fakliga/etiska støði sjúkrasystranna umframt
- At vegleiða um faklig/etisk ivamál, sum limir felagsins leggja fyri ráðið.
- Ráðið kann harumfamt av sínum eintingum taka spurningar upp til viðgerðar og metingar

Endamálsorðingin er broytt nakrar ferðir síðan tá, millum annað tí at heiti sjúkrarøktarfrøðingur kom í staðin fyri sjúkrasystrina. Í núverandi endamálsorðingini, eru lesandi eisini nevnd og fakliga er strikað. Tað var hildið at verða í so breitt orðað til hetta Ráðið.

Sambært Vøku nr. 2 frá 1993 var fyrst valda sjúkrasystra etiska ráðið fólkað við Ásu á Mýrini, Jóngerð Poulsen, Margit Hansen, Helenu Joensen og Ingrid Holm. Annars nevnir Vøka ikki so nógv um Sjúkrasystraetiska Ráðið hesi fyrstu árini, men tær eg havi tosað við, sum vóru við á onkran hátt tá, minnast aftur á tað stóra arbeiði, sum var lagt í, at orða etiskar leiðreglur. Hugt var bæði til Noregi, Danmark, Íslands og Onglands hesi fyrstu árini, og tað man hava tikið alla orkuna.

Í 1999 verða broytingaruppskot til galdandi leiðreglur lagdar fram og samtyktar á árliga

aðalfundinum hjá FFS. Tær verða prentaðar í Vøku sama ár og árið eftir skrivar forkvinnan í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum, Olga Magnussen, í síni ársfrágreiðing, at Ráðið hevur virkað aftur, síðan nýggj nevnd varð vald í 1997. Tær hava millum mangt annað arbeitt við at gera viðmerkingar til leiðreglurnar og hava eisini fingið mál til viðgerðar. T.d. vóru nakrar sjúkrasystrar sum skrivaðu inn til Ráðið við fyrispurningi um rættindi og skyldur hjá sjúkrasystrum at siga sína hugsan alment og luttaka í almennum orðaskifti um arbeiðsviðurskifti á egnum arbeiðisstaði. Fleiri undirspurningar vóru til evni og nógv av teimum bóru boð um, at her vantaði juridisk vitan. Vit vita ikki, hvat Ráðið hevur svarað teimum, sum hava spurt, men onki er at ivast í, at tað er hesin fyrispurningur sum fær Ráðið til at heita á SSF um at skipa fyri skeiðum um evnið við løgfrøðingunum Sigmund Poulsen og Hans Trúgva Teirin.

Um sama mundi tekur Ráðið eitt sera týdningarmikið mál upp av sær sjálvum, soleiðis sum ráðnum var heimilað longu í teim fyrstu viðtøkunum. Uttan at fara í smálutir, so snúi málið seg um gengranskingina, sum Pál Weihe vardi av. Tær sum tá vóru í Ráðnum, fylgdu væl við og kritiseraðu manglandi lógarkarmin um slíka sárbæra gransking. Tær skrivaðu greinar um evnið og forkvinnan Olga Magnussen var í Degi og Viku og kjakaðist við Pál Weihe um vandan við ónøktandi lógarverki. Endin var, at tær fingu steðga projektinum og tryggjað, at málið var tikið uppaftur í Løgtinginum, soleiðis at neyðugir lógarkarmar vóru settir. Tað var ikki granskingina sum so, sum tær opponeraðu í móti, men vildu bara tryggja, at alt rundan um var etiskt og juridiskt forsvarligt. Eitt rættiliga flott avrik, sum vit sjúkrarøktarfrøðingar, kunnu verða stoltar av.

Gjøgnum eitt 30 ára tíðarskeið, er sjálvandi nógv ymiskt avrikað og og ymisk evnir hava myndað arbeiði hjá ráðnum hesi árini. Eitt sum tó allatíð hevur verið avbjóðandi og er tað í ávísan mun enn, er, at Ráðið ikki er so sjónligt millum limirnar. Um tað er orsøkin til, at Ráðið sjáldan fær mál til viðgerðar, er kanska ikki so ósannlíkt – í øllum førum sum partur av frágreiðingini. Men sosialu miðlarnir hava givið okkum ein pall at samskifta við limirnar. Tað er ikki tí, at vit fáa nógv mál inn hóast tað. Men frá onki at fáa í nógv ár, til í fjør at fáa eitt og higartil í ár at hava fingið tvey, er vónandi tekin um eitt framstig á tí økinum eisini.

> **SOSIALU MIÐLARNIR HAVA GIVIÐ OKKUM EIN PALL AT SAMSKIFTA VIÐ LIMIRNAR**

Hóast arbeiði er breiðari enn sum so, eru tað serliga yrkisetisku leiðreglurnar, sum fólk kenna Ráðið fyri. Tað er eisini ein ógvuliga týðandi lutur og var sum sagt eisini tað allarfyrsta, sum Sjúkrasystra etiska Ráðið arbeiddi við. Tað var annars altjóða sjúkrarøktarfrøði felagið "International Council of Nurses" (ICN), sum tók stig til og góðkendi tær fyrstu altjóða sjúkrarøktaretisku leiðreglurnar í 1953. Grundarlagið undir at taka stigið, var sannkenningin av, at tey kor og karmar, sum sjúkrarøktarfrøðingar virka undir, ofta gera tað sera trupult at vita, hvør klinisk avgerð er "tann besta". Leiðreglurnar eru bygdar á altjóða mannarættingasáttmálan og okkara byggja uppá leiðreglurnar hjá ICN, tó at tær eru ítøkiliggjørdar í føroyskt jørðildi.

Men longu Florence Nightingale legði dent á etikk og moral. Í sjúkrasystralyftinum verður t.d. nevnt, at man sum sjúkrarøktarfrøðingur, pliktar seg til at útinna sín gerning í trúfesti. Sjúkrarøktarfrøðingurin pliktar seg eisini til at gera tað hon kann, til tess at varðveita og áhaldandi hækka dygdina í yrkinum og at áleggja sær sjálvum eina tagnarskyldu. Tað vil siga, at tagnarskyldan

skal haldast av moralskum og etiskum orsøkum, óansæð um hon verður lógarfest ella ikki.

Etikkur, eisini sjúkrarøktaretikkur, snýr seg um hvussu vit eiga at fara við hvørjum øðrum, hvussu vit eiga at handla, hvat vit eiga at gera og ikki minst við grundgevingum fyri hví. Etikkurin byggir á tey virðini, vit grunda okkara yrki á. Í flestum førum vil yrkisetikkurin endurspegla tey virðir og tey normar, sum samfelagið er grundað á, men ikki í øllum førum. *Overdrivelse fremmer forståelsen*, men eitt grelt dømi um, at samfelagsnormar og sjúkrarøktaretikkur ikki sampakkaðu, var í Nazitýsklandi. Man kann so sjálvandi diskutera, um tað vóru normar, sum fólk flest tóku undir við, men tað skerst ikki burtur, at tey flestu livdu eftir teimum. Tíbetur hava vit sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum ongantíð staðið í slíkari svárari støðu, sum sjúkrasystrarnar í Nazitýsklandi; men tað svitast ikki, at skulu vit áhaldandi varðveita og hækka dygdina í yrkinum, mugu vit viðurkenna okkum okkara samfelagsligu ábyrgd. Vit hava eitt priviligerað innlit í støðuna hjá teimum mest viðbreknu í okkara samfelag. Vit mugu tí verða teirra rødd og arbeiða fyri betri korum fyri tey, sum eru illa stødd so ella so. Um ikki vit, hvør so?

Etisku krøvini mugu tó ikki føra til moralska strongd. Altjóða gransking vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar ofta arbeiða undir umstøðum, sum eru kúgandi, sum føra til moralska líðing og at teirra leiklutur ofta er ógreiður og órímiliga krevjandi. Men gransking vísir eisini, at sjúkrarøktarfrøðingar hava lyndi til at finna fram til mátar at gera mótstøðu og til at hava ávirkan allíkavæl. Tað gera tær við at finna styrki í felagsskapinum, og við at verða áhaldandi í síni stremban eftir at gera tað, tær halda er rætt. Eitt dømi um hetta frá heimligum jørðildi, stavar frá tí tíðini, at foreldur ikki høvdu loyvi at verða innløgd saman við børnunum. Í staðin fyri treytaleyst at líða boðini, hugsaðu sjúkrasystrarnar tá um, hvat var rættast at gera og gjørdust ógvuliga kreativar í síni roynd, at smugla sengur inn seint á kvøldið og út árla á morgni, soleiðis at foreldur og børn kundu verða saman allíkavæl.

Arbeiðslívið hjá einum sjúkrarøktarfrøðingi er fult av moralskum støðum og etiskum tvístøðum, og ofta kann man sum sjúkrarøktarfrøðingur kenna seg bæði lítlan og hjálparleysan, tá man kennir seg noyddan at virða og virka eftir avgerðum, sum man ikki heldur verða etiskt forsvarligar. Tí er týdningarmikið, at vit arbeiða í felag og í felagsskapi og netupp í hesum sambandi, kann Sjúkrarøktaretiska Ráðið verða til gagn. Fleiri mál vit fáa inn, betri innlit fáa vit í eitt samfelagsligt mynstur, sum vit kunnu reagera uppá og seta á skrá í almenninginum.

> **TÍ ER TÝDNINGARMIKIÐ, AT VIT ARBEIÐA Í FELAG OG Í FELAGSSKAPI OG NETUPP Í HESUM SAMBANDI, KANN SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ VERÐA TIL GAGN.**

Eitt sum gongur aftur í fundarfrágreiðingum gjøgnum øll árini, SER hevur virkað, er spurningurin: Hvat vilja limirnir og harvið felagið við Sjúkrarøktaretiska Ráðnum? Hesin spurningur verður settur upp á ymiskar mátar, men eftir stendur, at gjøgnumgangandi er ein ávís óvissa um, hvussu man best brúkar avmarkaða tilfeingið til so stórt gagn sum gjørligt. Tá vit í mai mánað aftur fara rundferð í landinum, er endamálið millum annað netupp at spyrja limirnir: Hvørji ynskir og væntanir hava tit til Sjúkrarøktaretiska Ráðið? Svarini frá limunum, poddarnir, sum vit framleiddu saman við KVF í fjør, stuttsøgurnar, sum komu inn í samband við stuttsøgukappingina, mál sum eru komin inn og tey sum vónandi fara at koma, og alt tað,

sum undanfarin ráð hava latið eftir seg, fara at lýsa Sjúkrarøktaretiska Ráðnum vegin fram á leið tey komandi árini. Tað liggur ein ábyrgd á Sjúkrarøktaretiska Ráðnum at virka fyri, at menna etiska tilviti hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Tað kann óiva gerast upp á nógvar mátar, men vert er at hava í huga, orðini hjá Florence Nightingale:

*"Lat tann, sum hevur ábyrgdina, hava hendan einfalda spurning fyri eyga: Ikki bara, hvussu kann eg altíð gera tað rætta sjálv, men hvussu kann eg syrgja fyri, at tað rætta altíð verður gjørt."*

Hesi orð hennara, verða tað ljós, sum fer at vegleiða Ráðið, á fyri okkum enn duldum framtíðareiðum.

Eg fara at nýta høvi til at takka øllum tykkum, sum komu at hátíðarhalda dagin saman við okkum. Harafturat fari eg at takka øllum, sum hava verða við í ráðnum hesi seinastu 30 árini og sum øll hava lagt orku í, at virka til frama fyri dygdargóða sjúkrarøkt. Eisini vilja vit takka skiftandi nevndum og forfólki í FFS, sum øll árini hava verið tættir samstarvs- og sparringsfelagar. Men størstu tøkkina eiga allir teir sjúkrarøktarfrøðingar, sum dagliga liva við teimum mongu etisku tvístøðunum og gera sítt besta, til at gera tað rætta.

Sjúkrarøktaretikkur er eitt ógvuliga víðfevnt og samansett økið. Men tá alt annað er skrædlað burtur, stendur eftir, at grundleggjandi skyldan hjá sjúkrarøktarfrøðingum er at vísa umsorgan fyri øllum sum líða, uttan mun til, hvørji tey eru ella hvør orsøkin til líðingina er.

# SER Á FERÐ

Um mánaðarskifti maj/juni, var Sjúkrarøktaretiska Ráðið á ferð og vitjaði á Tvøroyri, Klaksvík og í Tórshavn. Við okkum høvdu vit Súsonnu Olsen, samfelagsfrøðing, sum helt fyrilestur við yvirskriftini “Yrki, aldurisma og storytelling”. Men høvuðsorsøkin til hesa rundferð var, at øll 30 árini, SER hevur á baki, hava skiftandi ráð ivast í, hvussu limirnir halda, at orkan í ráðnum verður brúkt best. Tá fyrilesturin var av og fólk høvdu fingið ein kaffimunn og høvi at práta saman, settu vit teimum hesar dialogspurningar:

- Er neyðugt, at hava eitt Sjúkrarøktaretiskt ráð? Grundgev fyri svarinum
- Hvørjar væntanir hava tit til eitt SER?
- Hvat halda tit, at SER skal gera meira av?
- Er okkurt tit halda, SER skal gera minni av?

Uppmøtingin var nakað løk, men tilsamans vóru tað 15 fólk sum møttu og tað er so nógv frægari enn ongin. Vit fegnast um hvønn einstakan, sum tók sær tíð at koma til tiltøkini og takka hjartaliga fyri teirra áhuga og íblástur. Somuleiðis vilja vit nýta høvi at takka Súsonnu Olsen, varastjóra á Klaksvíkar Sjúkrahúsið og Gunnbjørg Guttesen, varastjóra á Suðuroyar Sjúkrahúsið, fyri alla hjálp og miklan blíðskap.

Niðanfyri er samanumtøka av tí sum kom fram, sett upp í yvirskriftir:

### VERÐA ALMENN RØDD

- Fanga og reagera uppá rák í samfelagnum
- Luttaka í samfelagskjakinum
- At miðla og seta fokus á ymiskar etiskar søgur og støður

### VERÐA UPPSØKJANDI

- Vitja á arbeiðsplássum
- Arbeiða fyri at fáa refleksjónsrúmd sum ein náttúrligan part av arbeiðnum á øllum arbeiðsplássum
- Skipa fyri undirvísing, soleiðis at sjúkrarøktar-frøðingar eru betri førir fyri at handfara etiskt truplar støður

### RÁÐGEVING

- Hava opna tlf. ráðgeving, so sjúkrarøktar-frøðingar altíð kunnu ringja inn
- Leggja etiskar støður á facebookbólkin og heimasíðuna so sjúkrarøktarfrøðingar kunnu venja hegni, til at greina etiskar tvístøður
- Liminir kunnu
- Samskifta meira við SER, t.d. við at senda inn hugskot til temu at taka upp

Annars er at siga, at limirnir saknaðu at hoyra meira um yrki í almenna rúminum. Millum annað varð tosað um, at SER kanska kundi verið skipað øðrvísi, soleiðis at tað var partur av dagliga arbeiðnum í FFS, t.d við at eitt starvsfólk er sett, sum hevur “tað fakliga” sum høvuðsøki. Eitt slíkt fólk kundi so veri ein stuðul hjá SER, sum hevur avmarkaða orku, við tað at tað er eitt ráð, grundað á ólønt arbeiði, sum fólk gera í síni frítíð.

# NORÐURLENDSK RÁÐSTEVNA

Hin 7. og 8. september í ár skipaði SER fyri árligu ráðstevnuni fyri norðurlendsk Sjúkrarøktaretisk Ráð. Evnið var "Sprogets betydning for etikkens rum i sygeplejen". Á ráðstevnuni var orðaskifti um maktina í málinum og ávirkanina, sum málið hevur, eisini á sjúkrarøktina. Ein makt, sum kemur til sjóndar í teimum orðum, vit sum sjúkrarøktarfrøðingar brúka og teimum vit ikki brúka. Málið kann bæði stuðla, lekja og byggja brýr, sum sambindur okkum við sjúklingarnar, arbeiðsfelagar og samfelagið. Á ráðstevnuni staðfestu vit enn einaferð, at tað eru somu etisku trupulleikar, sum gera seg galdandi í øllum teim norðurlendsku londunum, eisini tá tað kemur til etikk, mál og málbrúk. Felags framsøgnin er tí ein spegling av teimum etisku punktunum, sum norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku Ráðini halda vit eiga at geva serligum gætur, tá tað kemur til etikk og málbrúk í norðurlendskum heilsuverkum.

## FRAMSØGN frá norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðunum í samband við Norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku ráðstevnuna hin 6. og 7. september 2023

Í møtinum millum sjúkrarøktarfrøðingin og sjúklingin, eru tveir serfrøðingar. Sjúklingurin er serfrøðingur í egnum lívi og lívsverð, meðan sjúkrarøktarfrøðingurin umboðar heilsuverkið, viðgerðarmøguleikarnar og sítt egna fak. Hitt talaða málið er ein týdningarmikil liður, til at byggja brýr í hesum spenningarøki.

Yvirhøvur hevur málið ein týðandi leiklut í sjúkrarøktini, og hevur stóra ávirkan á, hvussu vit fata og fremja etikk innan økið. Mátin, sum vit nýta málið uppá, vísir ikki bara hvussu vit samskifta, men eisini hvønn hugburð og hvørji virðir vit hava við okkum í møtinum við sjúklingar. Hvørt orð vit velja og hvør setningur, vit seta saman, hevur íbornan møguleika til at ávirka lívsstøðu og trivnað hjá sjúklinginum. Við orðunum kunnu vit fremja umvendan lummastuldur, við ótilvitað ella tilvitað at viðvirka til vónloysi og ørkymlan og áleggja sjúklinginum eina lívsstøðu, hann ikki hevur tørv á. Tilvitska um ójavnan í møtinum millum sjúkrarøktarfrøðing og sjúkling hevur ein týðandi leiklut í at sleppa sær undan umvendum lummastuldri. Sjúklingurin kemur ikki til sjúkrarøktarfrøðingin av hugi, men av tørvi fyri sjúkrarøktarfrøðiligum fakkunnleika. Hann leggur sítt lív í okkara hendur og vísir okkum álit, ið krevur etiskt og fakligt umhugsni millum sjúkrarøktarfrøðingar. Við umhugsni og refleksjón kunnu vit skerpa tilvitið um tað ótilvitaða og geva okkum far um tey virði, vit vilja, skulu eyðmerkja sjúkrarøktina.

Málið innan heilsuverkið leggur ofta áherðslu á úrslit, ið kunnu mátast. Tað máar støðið undan relationellu og etisku pørtunum av sjúkrarøktini.

Tí mugu vit minnast til, at tað at skapa álit og menna sambond við sjúklingar, er eitt týdningarmikið arbeiði, hóast tað ikki altíð kann mátast ella vigast ella skapa skjót úrslit.

Tað er týdningarmikið at viðurkenna og fáa møguleika fyri at skjalfesta teir partarnar av sjúkrarøktini, sum ikki kunnu mátast beinleiðis og har úrslitið ikki sæst beinanvegin. Eitt dømi um hetta eru samtalur við sjúklingar um t.d einsemi. Líðing kann ikki kvantifiserast út frá einum búskaparligum hugsanarhátti. men krevur eina holistiska tilgongd, sum bæði fevnir um likamligu og sálarligu heilsuna, ið sínámillum ávirka og ávirkast hvør av øðrum og umhvørvinum.

Etisku grundgevingarnar í heilsuverkinum, fyri at leggja dent á úrslit, ið kunnu mátast, er einamest grundað á nyttuetiska áskoðan, út frá eini búskaparligari fatan, har nytta verður máld í peningi. Men vit eiga eisini at knýta nyttu at øðrum virðum, so sum vælveru, trivnað og umsorgan. Tað er ein fortreyt, skulu vit fáa rættlag í javnvágina millum tað instrumentella og tað relationella í sjúkrarøktini, og í miðlingini av sjúkrarøktaretisku virðunum. Bert soleiðis kunnu vit tryggja, at allir sjúklingar fáa dygdarbestu røkt og umsorgan.

Tað hevur eisini týdning at viðurkenna, at etiska samrøðan sjáldan fær tað uppmerksemi, hon hevur uppiborið ella tað rúmd, vit hava brúk fyri. Avgerðir um viðgerð, útgreining ella ikki-viðgerð kunnu vera torgreiddar, og tongdar at ymiskum grundgevingum og áhugamálum. Tí er týdningarmikið, at raðfesta etiska orðaskifti og refleksjónina, sum ein íbornan part av sjúkrarøktarvirkinum. Sjúkrarøktarfrøðingar mugu krevja at fáa tíð og rúm til etisku refleksjónina, fyri at tryggja at sjúklingar og sjúkrarøktarfrøðingar kunnu møtast sum javnverdir partar í røktargongdini og saman taka avgerðir, sum best ganga tørvi og tign hjá sjúklingunum á møti.

Hetta var ein sera áhugaverd og gevandi ráðstevna, við nógvum góðum fyrilestrum. Skráin var ógvuliga fjølbroytt, við fokus á at fáa lýst evnið út frá nógvum ymiskum sjónarhornum. Umframt 3 sjúkrarøktarfrøðingar, var fyrilestrarrøðin umboðað av sálarfrøðingi, filosoffi, presti og retorikara.

## FYRIREIKINGARTEKSTUR **Til at fyrireika seg, fingu fyrilestrahaldararnir soljóðandi tekst frá okkum:**

### SØGAN UM EVNIÐ

Á seinastu norðurlendsku ráðstevnu fyri Sjúkrarøktaretisk Ráð, sum var hildin í Grønlandi í oktober 2022, gekk setningurin *"Det etisk sårbare skriver vi ikke om - det snakker vi om"* aftur í framløgum og samrøðum millum tey luttakandi. Hesin setningur lýsir væl tað spennið, sum sjúkrarøktarfrøðingar (og onnur heilsustarvsfólk) eru í til dagligt: At veita umsorgan í eini skipan, sum krevur og vektar effektivitet og málbar úrslit. Tað er ikki tí, at tað er eitt nýtt fyribrigdið. Jürgen Habermas lýsti hetta fyribrigdið við hugtøkunum system og lívsverð. Hugtakið um lívsverð hevur hann frá týska filosoffinum Edmund Husserl (1858 – 1938), men Habermas problematiseraði tað, at *"systemið koloniserar lívsverðina"*, sum sæst aftur í, at *"Det etisk sårbare skriver vi ikke om - det snakker vi om"*.

Ein annar ástøðingur, sum hevur fingist nógv við henda problematikkin, er filosoffurin og sjúkrarøktarfrøðingurin Kari Martinsen, sum kritiserar sjúkrarøktina fyri, í mongum førum at lata umsorganina og sambandið millum sjúkrarøktarfrøðing og sjúkling dvína fyri teknisku ella instrumentellu sjúkrarøktini.

### TRUPULLEIKAR SUM STANDAST AV ÓJAVNANUM MILLUM SYSTEM OG LÍVSVERÐ

Eitt sum hevur stóran týdning, tá tað kemur til menniskjansliga umsorgan og sambandið millum sjúkrarøktarfrøðing og sjúkling, er *"at skunda sær seint"*. Sambært Martinsen merkir tað, at sjúkrarøktarfrøðingar skulu taka sær tíð til at skilja ynskir og tørv hjá sjúklinginum og ikki bara at hava fokus á, at skunda sær at útinna teknisku uppgávuna. Men tað kann verða trupult, tá tað er útinningin av teknisku sjúkrarøktini, sum systemið spyr eftir og metir sjúkrarøktarfrøðingin uppá.

Setningurin *"Det etisk sårbare skriver vi ikke om - det snakker vi om"* bendir á, at enn hava vit orð fyri at lýsa tað etiskt sárbæra, tí vit tosa um tað. Ella rættari, vit hava førleikar til at tosa um tað. Enn. Vandi er tó fyri, at vit missa hesar førleikar, tá skipanin ikki spyr eftir tí og í nógvum førum ikki gevur rúm fyri at tosa um tað heldur. T.d. er *"munnliga rapportin"* - t.v.s. tann hálvi tímin, tá fráfarandi vaktin munnliga samrøddi við komandi vaktina um bestu røktina til sjúklingarnar - spard burtur, í summum førum í samband við effektiviseringar, í øðrum førum í samband við, at elektroniska sjúklingajournalin varð etablerað. Elektroniska journalin er aloftast standardiserað soleiðis, at serstaka menniskjalívið og -líðingin ikki fær rúmd og vandi er tí fyri, at tað gleppur okkum av hondum. Sum ein av sjúkrarøktarfrøðingunum í poddrøðini, sum SER framleiddi saman við KVF í fjør, málbar seg: Vit hava standardir fyri so mangt sum skal mátast og vigast, men vit mangla menniskjaligar standardir.

Ein triði ástøðingur, sum skrivar um evnið, frá einum eitt sindur øðrvísi vinkli, er filosoffurin og sjúkrarøktarfrøðingurin Merry Scheel, sum hevur ment ástøði um *"Interaktionel sygepleje"*. Hon byggir sítt ástøði á ta grundfatan, at tað er nakað serstakt og nakað generelt í hvørji einastu sjúklingastøðu:

> "Den interaktionelle sygeplejepraksis har to niveauer. Et universalistisk niveau med det sigte at medvirke til at skabe sunde livsbetingelser for hele befolkningen. Der argumenteres for lige og retfærdig fordeling af ressourcer til pleje og omsorg og for forbedrede vilkår for de svage.
>
> Det andet niveau er et situationsorienteret, konkret praksisniveau, hvor der ydes pleje og omsorg til den enkelte patient i en konkret situation. Disse to niveauer er uadskillelige og påvirker hinanden gensidigt."

Út frá hesum kann man siga, at vit eisini eru noydd til at lýsa etikkina ***úr sjónarhorninum frá lívsverðini***, og insistera uppá at hon fær rúmd millum ***hørð tøl og fakta í vælferðarsysteminum***. Um ikki, kunnu bæði tvey syndrast, við katastrofalum fylgjum fyri land og fólk.

Man kann siga, at vit eru mitt í einum málstríði, sum á mangan hátt er at líkna við føroyska málstríði. Tó so er ein týðandi munur, í og við at føroyska málstríði snúði seg um, at annaðhvørt danskt ella føroyskt mátti dvína. Tað er ikki talan um her. Vit hava tørv á systemmálinum, men í javnvág við lívsverðinsmálið.

Ein annar táttur er vandin fyri, at við tað, at vit brúka "tekniskt" málbrúk, sum systemið spyr

eftir, verða vit blind fyri tí etiskt problematiska í, at vit flyta okkum frá einum solidariskum vælferðarsamfelag til eitt “gjaldssamfelag”, har vandin fyri sosialum ójavna bara veksur.

Ein trupulleiki, sum fyllir nógv í øllum heiminum, er ovurstóri tørvurin á sjúkrarøktarfrøðingum, sum ikki stendur mát við hvørki verðandi tal av sjúkrarøktarfrøðingum ella av tilgongdini til fakið. Sum norska forkvinnan Mildrid Hauge sigur í einum brævasamskifti okkara millum:

> Vi kan stå i opptakten til en nasjonal katastrofesituasjon om man ikke får flere sykepleiere…

Víðari skrivar hon, at man kann vísa á so nógv etisk vansketni innan umsorganarøkið, og at tað eru tey allarveikastu - tey sum hvørki hava avvarðandi ella fíggjarorku - sum verða harðast rakt.

Tá rúm ikki er fyri at brúka mál, sum kann lýsa etiska vansketni, eru vit sum sjúkrarøktarfrøðingar og umboð fyri systemið við til at vanskepla ”tað góða samfelagið”, sum tað annars er partur av virðisgrundarlagi okkara at verja.

Í áðurnevndi poddrøð, har 4 sjúkrarøktarfrøðingar tosa um sjúkrarøkt og etikk, eru fleiri temu, sum leggja seg afturat problematikkinum við málbrúki, systemi og lívsverð. Tær vísa á, at sjúkrarøktarfrøðingurin er eitt amboð, sum má haldast við líka á jøvnum føti við onnur amboð.

Aftur her sæst ein ójavni millum sjúkrarøktar-frøðingin, sum eitt instrumentelt amboð og sum eitt etiskt amboð, har instrumentellu førleikarnir fáa størri rúmd enn teir etisku. Supervisión og refleksjón verður raðfest ov lágt, halda tær og í summum førum kann fylgjan verða umsorganarmøði, at fólk brenna út og í ringasta føri forráilsi. Etisk forsvarlig sjúkrarøkt inniber m.a. at hava virðing fyri lívinum, lívsáskoðanum og lívssøgunum hjá teimum, vit í okkara yrki vara av. Tað at menna og viðlíkahalda førleikar og eginleikar hjá sjúkrarøktarfrøðingum sum eitt etiskt amboð, er ein fortreyt fyri at tað ber til. Ein grundtreyt fyri at tað kann lata seg gera, er at vit varðveita og áhaldandi menna málið, sum kann lýsa hesi fyribrigdi, og umstøður, sum loyva okkum rúm og tíð til at menna okkum sum etiskt væl grundaðir sjúkrarøktarfrøðingar, til gagns fyri øll tey, sum hava tørv á okkum.

Í seinastu løtu avgjørdu vit at taka fyrilestrarnar upp og at leggja teir út á okkara nýstovnaðu youtube-kanal, sum ber heiti “Sjúkrarøktaretiska Ráðið”.

---

Filmarnir vóru lagdir út á altjóða etikkdegnum hin 18. november. og kunnu síggjast her:
https://www.youtube.com/results?search_query=sj%C3%BAkrar%C3%B8ktaretiska+r%C3%A1%C3%B0i%C3%B

# SAMSTARV VIÐ ONNUR

Í ár hava tað bert verið tveir netfundir millum norðurlendsku forkvinnurnar. regluligu fundirnir hava verið órógvaðir av forkvinnuskifti og stórum útskifti í bæði danska og norska ráðnum. Danska Ráðið er farið til verka, men norska ráðið hevur sín fyrsta veruliga arbeiðsfund í januar mánað. Eftir tað, verða regluligu fundirnir óiva tiknir uppaftur.

Samstarvið við Etiska Ráðið (ER) hevur eisini verið munandi minni í ár enn í fjør. Forfólkini í ER, SER og Psykologfelagnum saman við aðalskrivaranum í ER hittust tó beint fyri jól, har vit m.a. tosaðu um, hvørt vit kunnu verða saman um tiltak ella átak í 2024. Ongin avgerð varð tó tikin um nakað ávíst.

Tíðliga í summar hittust SER og FPS á fundið um at hava eitt tiltak í felag í oktober, men ætlanin bar tíverri ikki á mál.

Harumframt samstarva vit við nevndina í FFS um bókaútgávu, umframt at vit hava fingið dyggan stuðul til tiltøk, sum vit takka hjartaliga fyri.

# MIÐLING OG SAMSKIFTI

Vit royna at verða so aktiv á Facebook bólkinum, sum orkan loyvir. Tað er yvir 600 limir í bólkinum, men hóast tað, er tað nokkso nógv einvegis samskifti.

Vit vita sostatt ikki, um bólkurin ger nakað serligt gagn, men hann ger so ongan skaða, so vit halda áfram og vóna, at onkur fær gleði av onkrum.

Í ár hava vit lagt okkum eftir at leggja ein refleksjónsspurning út sirka einaferð um mánaðin. Koma vit fram á tilfar, vit halda verða viðkomandi, leggja vit tað út og vilja eggja øðrum til at gera tað sama. Tað kemur fyri, at limir av sínum eintingum luta okkurt ella spyrja um okkurt, sum vit kunnu reflektera um í felag og tað fegnast vit í nevndini um.

# Á SKRÁ

Sum undanfarna ár, byrja vit árið við einum arbeiðsdegi. Hesin verður hósdagin 4. januar og tann dagin fara vit at leggja ætlanir fyri 2024. Umframt áhaldandi arbeiði við bókaútgávu, liggur tó fast, at SER saman við Føroyskir Psykiatriskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FPS) skipar fyri temadegi við Dorthe Birkemose fríggjadagin hin 13. september. Dorthe Birkemose er serliga kend fyri bókina *"Når gode mennesker handler ondt"*.

Til ber at lesa meira um Dorthe Birkemose á https://dorthebirkmose.dk/

At enda fara vit at takka fyri árið í fór og gleða okkum til at fara til verka í 2024 😊

Sjúkrarøktaretiska Ráðið
Jana Mortensen, forkvinna
Lilian Dam, næstforkvinna
Birna Mohr Joensen, skrivari
Marjun Thomsen, nevndarlimur
Katrine Klein Arnbjerg, nevndarlimur
Eva Mortensen Holm, nevndarlimur
Ingun Gaardbo, nevndarlimur



ANNIJANNI

Sjúkrarøktaretiska
Ráðið

Meira kunning um Sjúkrarøktaretiska Ráðið fæst á heimasíðuni hjá
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar: ***www.sjukrarokt.fo***

Vit eru eisini at finna á Facebook: Sjúkrarøktaretiska Ráðið
***https://www.facebook.com/groups/524279708341248/***

Samband fæst við ráðið við telduposti á: ***etikkur@sjukrarokt.fo***